# Bókakafé á Býarbókasavninum

# Mars 2018



1. **Helle Helle: Hvis det er (2014) – 143 síður**

Tveir rennarar renna inn í hvønn annan í einum stórum skógi í Jútlandi. Tað tekur teimum tveir dagar at finna út aftur úr skóginum, og hesar tveir dagarnar eru tey saman alla tíðina.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

2. **Hallgrímur Helgason: Søsyg i München (2017) – 353 síður**

Tá ein ungur maður flytir úr Íslandi til München at lesa á Listaakademiinum, verður hann tveittur út í ein bardaga við seg sjálvan, við Týskland, við listina og við tað at gerast vaksin.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

3. **Ingar Johnsrud: Wienerbroderskabet (2016) – 427 síður**

Krimisøga um løgreglumannin Fredrik Beier, sum leitar eftir eini horvnari kvinnu, sum er limur í sektini "Guds ljós". Men hópdráp verður framt á sektina, og knappliga er Fredrik og nýggi makkarin hjá honum, Kafa Iqbal, blandaðir upp í eitt spæl, sum teir ikki skilja.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

4. **Margaret Atwood: Tjenerindens fortælling (4. útg. 2017, uppr. 1985) – 365 síður**

Framtíðarskaldsøga fortald av eini kvinnu, sum er "tænarinna" í einum nýggjum einaræðisstýri. Hon hevur mist alt sítt lív, sum hon kendi tað áður við manni og barni, og er nú tvungin at tæna einaræðisstýrinum sum ein, sum kann føða teimum børn í einum dystopiskum samfelagi, har børn eru ein mangulvøra.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

5. **Kristina Sandberg: Et barn at føde (2017) – 478 síður og At sørge for sine (2017) – 494 síður**

Røðin er í trimum pørtum. Í bókin “Et barn at føde” fylgja vit Maj í gerandisdegi hennara í árunum 1938 til byrjanina av 1940. Man kemur heilt inn undir húðina á Maj og fylgir tonkum, kenslum og virki hennara. Í næstu bókini, “At sørge for sine”, er Maj heimagangandi húsmóðir og verður mamma fyri aðru ferð, men upplivir herðindi av angist, eftir at foreldur hennara doyggja og ein stórur eldur hevur herjað í býnum.  Hon noyðist tí at seta eina unga gentu í arbeiði, sum kann ganga henni til handa við dagliga arbeiðinum og at ansa børnunum.

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

6. **Kate Chopin: En kvinde vågner (2016, upprunaútg. 1899) – 271 síður**

Edna keðir seg í sínum hjúnabandi og gerst hugtikin av einum kreolskum manni í New Orleans í 1890’unum. Hvussu langt kann hon fara fyri at frígera seg sjálva?

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

7. **Maja Lunde: Biernes historie (2016) – 473 síður**

Býflugur hava alt at siga fyri fræhandlaran William í 1852, somuleiðis fyri tann amerikanska býflugubóndan George í 2007 og eisini fyri tann kinverska handdustaran Tao í 2098 og fyri teirra familjulív.

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

8. **Pablo Llambías: Natteskær (2017) – 341 síður**

Ein miðaldrandi maður skal skiljast frá ungu konu síni. Hann hyggur aftur á teirra buldrasliga og harðliga parlag og stutta hjúnaband.

________________________________________________________________________

________________________________________________________________________

### 9. Faïza Guène: Kiffe kiffe i morgen (2010) – 176 síður

Virðislønt fronsk skaldsøga um ungu gentuna Doriu, sum er ættað úr Marokko og býr í eini ghetto uttan fyri Paris saman við mammu síni. Tað er strævið at vera tannáringur og tilflytari og skula fóta sær í fleiri mentanum í senn.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 10. Anna Gavalda: Jeg har elsket (2002) – 139 síður

Fronsk skaldsøga um ungu kvinnuna Chloé. Maður hennara er rýmdur við eini aðrari kvinnu, og Chloé, døturnar og verpápin eru farin í summarhús. Verpápin, sum annars er ein rættiliga tigandi maður, sigur Chloé um eina líknandi søgu í sínum ungdómi, og samstundis fáa vit søguna um kærleikan og hjartasorgina hjá Chloé.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 11. Elia Barceló: Guldsmedens hemmelighed (2005) – 82 síður

Magisk realisma á sponskum og ein sjáldsom søga um kærleikan millum ein ungan mann og eina nakað eldri kvinnu. Men les ikki tekstin á bakpermuni, tí hann sigur alt ov nógv um søgugongdina!

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 12. Josef Haslinger: Phi Phi Island – en beretning. Ævisøga (2007) – 176 síður

Tað kom púra óvart á, tá ein tsunami rakti Thailand á jólum í 2004, og hundraðtúsundatals fólk gjørdust heimleys ella lótu lív. Josef Haslinger, konan og stóru børn teirra vóru millum ferðafólkini á Koh Phi Phi, og bókin er ein persónlig frásøgn um tsunamiina og um hvussu tey fýra megnaðu at bjarga lívinum. Hóast umstøðurnar eru tragiskar, er hetta ein áhugaverd bók, har lesarin fær kensluna av, hvussu tað er at vera mitt í eini umfatandi katastrofu.

______________________________________________________________________________

______________________________________________________________________________

### 13. Nina Aisha Rasmussen: Pilgrim i Mekka. Ævisøga/ferðafrásøgn (2007) – 156 síður

Nina Rasmussen hevur saman við manninum Hjalte Tin verið á nógvum spennandi ferðum. Í 2006 konverteraði hon til islam fyri at fáa møguleikan at luttaka á pílagrímsferð til Mekka. Á ferðini vitjar hon støð, har einans muslimar hava atgongd, og á longu teinunum og í trongligu náttarskjólunum kemur hon at kenna muslimar úr øllum heiminum og lærir um bæði islam og seg sjálva.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 14. Claus Rudbeck: Én gang eventyrer – altid eventyrer. Ævisøga (2012) – 229 síður

Tá Claus sum 25 ára gamal júst var fluttur til Keypmannahavn, møtti hann ein dagin av tilvild einum eldri manni, sum hann helt seg bera kenslu á. Hann spurdi varliga, um hann mundi vera sjónleikarin Palle Huld, og so var. Claus kendi Palla aftur sum sjónleikari, men tá hann kannaði nærri, las hann, at lívið hjá Palla Huld hevði verið nógv meira enn sjónleikur. Hóast 70 ára aldursmun birtist eitt vinarlag teirra millum, og Claus fekk nógvar góðar søgur frá lívinum hjá Palla. Millum annað um tá hann sum 15 ára gamal ferðaðist kring jørðina í 44 dagar, ein ferð, sum sigst at hava givið rithøvundinum Hergé íblástur til teknirøðirnar um Tintin.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 15. Palle Huld: Jorden rundt i 44 dage. Ferðafrásøgn (2012, uppr. 1928) – 161 síður

Í 1928 burturlutaði dagblaðið Politiken eina ferð kring jørðina í sambandi við, at 100 ár vóru liðin, síðan Jules Verne varð føddur. Av tilvild nevndi onkur kappingina fyri 15 ára gamla Palla, sum møtti upp til úttøkuroyndina og púra óvæntað vann ferðina. Uppgávan var at kanna, hvussu langa tíð tað nú tók at ferðast kring jørðina á skjótasta hátt, eins og Phileas Fogg gjørdi tað í “Kring jørðina í 80 dagar”. Hetta er ferðadagbókin hjá Palle Huld.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 16. Nick Cave: Brækposesangen (2015) – 165 síður

Bókin inniheldur skitsur og notur eftir kenda australska tónleikaran Nick Cave (f. 1957), sum hann hevur skrivað og teknað á spýggiposarnar hjá ymsum flogfeløgum, sum hann fleyg við, tá hann var á turné í USA.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 17. Mariana Enriquez: Ting vi mistede i ilden (2017) – 269 síður

Sterkar og rámandi stuttsøgur í nútímans Argentina um fátækradømi, kriminalitet og harðskap kryddað við eitt sindur av tí yvirnáttúrliga.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 18. Auður Ava Ólafsdóttir: Svaner bliver ikke skilt (2016) – 338 síður

Knappliga er eitt 11 ára langt hjúnaband bara liðugt, tá Flóki fortelur, at hann er samkyndur. Maria noyðist nú við hjálp frá undirbúgvanum Perlu at fáa skil upp á tilveruna aftur.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 19. Dag Solstad: T. Singer (2016) – 235 síður

T. Singer er "evigheitsstudentur", men velur aftaná nógv ár at lesa til bókavørð. Eftir lokna útbúgving fær hann arbeiði á bókasavninum í Notodden og flytur hagar. T. Singer fellur væl til og hittir Merete, sum eigur eina dóttur. Hann giftist Merete, men hetta vísir seg at hava lagnutungar fylgjur fyri T. Singer.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 20. Abdel Aziz Mahmoud: Hvor taler du flot dansk (2016) – 197 síður

Journalisturin og sjónvarpsverturin Abdel Aziz Mahmoud (f. 1983), sum flýggjaði til Danmarkar saman við familju síni í 1984, fortelur um sína integratión í danska samfelagið, og varpar ljós á mongu paradoksini, sum stinga seg upp, tá kjakast verður um integratión.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________

### 21. Stefan Zweig: Heimurin, ið var: endurminningar hjá einum evropeara (2017) – 496 s.

Undirgangssøgan hjá rithøvundinum Stefan Zweig (1881-1942) er ein ávaring til okkara egnu tíð. Bókin er ikki bara ein undirgangssøga um Europa, men ein skakandi vitnisburður um, hvussu djúpt vit kunnu søkka, og hvussu ófatiliga skjótt tað kann ganga.

____________________________________________________________________________

____________________________________________________________________________